# Obama hitti Gorbatjov

Talsmenn hjá Hvítu Húsunum avdúkaðu í gjárkvøldið, at Barrack Obama, forseti, hitti tann seinasta sovjetska forsetan, Mikhail Gorbatjov, í síðstu viku. Teir báðir hittust í Washington og tosaðu um, hvat kann gerast fyri at bøta um viðurskiftini millum USA og Russland. Sambært talsmonnunum skuldi Gorbatjov bara hitta Joe Biden, varaforseta, men mitt undir fundinum teirra millum valdi Obama at fara inn at taka lut í orðaskiftinum, skrivar AP. Í næstu viku fer Obama á fund hjá G20-londunum í London, og tá skal hann hitta russiska forsetan, Dmitrij Medvedev.



# Dómur í Rwanda

Joseph Mpambara, sum var ein av hutu-leiðarunum undir tí ræðuliga hópdrápinum í Rwanda í 1984, varð í gjár dømdur 20 ára fongsul fyri sín lut í drápinum. Joseph Mpambara kom ikki fyri tann serliga Rwanda-dómstólin, men bleiv fluttur til Haag og settur fyri krígsbrotsmanna-dómstólin har. Hann bleiv tó fríkendur fyri krígsbrotsverk, men dømdur sekur í at hava beint fyri tveimum kvinnum og minst fýra børnum. Umleið 800.000 fólk, nógv tey flestu av tutsi-fólkinum, lótu lív í hópdrápinum í Rwanda, sum vardi 100 dagar.



*Heðin Mortensen greiðir frá nýggju heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu í sambandi við 100-ára haldið. Øll í verandi Tórshavnar kommunu kunnu vera við at geva sítt íkast til søguliga savnið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skulu skriva egna søgu

**Nýggja 100-ára heimasíðan hjá Tórshavnar kommunu leggur upp til, at borgarar í kommununi skulu geva sítt íkast til tað, sum við tíðini kann gerast ein tíðandi partur av søguni hjá kommununi**

100-ÁRAHALD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fríggjadagin læt Tórshavnar kommuna upp eina nýggja heimasíðu í sambandi við 100 ára hátíðarhaldið hjá Havnini sum sjálvstøðug kommuna.

Kommunan hevur eina heimasíðu framman undan, men hendan, sum nú er latin upp, er nakað øðrvísi enn vanligar heimasíður.

– Hetta er ein heimasíða, sum meiri vendir sær móti tí søguliga partinum hjá kommununi. Men tað ber eisini til at fara inn og síggja, hvørjir aktivitetir, kommunan hevur í sambandi við 100 ára haldið, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Tað serliga við hesari heimasíðuni er, at allir borgarar í kommununi, kunnu fara inn á heimasíðuna og geva sítt ískoyti til søguna hjá kommununi.

- Ein og hvør borgari, antin teir so búgva í kommununi í dag, ella eru fluttir til útlandið, kunnu fara inn á heimasíðuna og greiða frá egnum upplivingum í kommununi. Minnast aftur á barnadagar ella ungdómsdagar, hvussu tað var at vaksa upp í kommununi tá, ella hvat tað nú skuldi verið. Og eigur viðkomandi myndir at lata við, eru tær sjálvandi vælkomnar, tí tær geva eitt eyka inntrykk, sigur Heðin Mortensen.

Úr øllum hesum frágreiðingum og søgum ber so til at fáa eina fjølbroytta og áhugaverda felags søgu um kommununa.

- So allir føroyingar og útlendingar við kunnu fara inn á hesa heimasíðuna og fylgja við, hvussu søgurnar um Havnina mennist, og tað halda vit er ógvuliga spennandi, sigur Heðin Mortensen.

## DVD í hvørt hús

Nú er tað sjálvandi ikki so, at tað ber til at fara beinleiðis inn á heimasíðuna og skriva óredigerað, tað sigur seg sjálvt.

- Nei, tað er soleiðis, at alt skal um eina redaktión, bæði fyri at tryggja, at søgurnar ikki gerast ov langar, men eisini fyri at vit kunnu vera vís í, at talan er um søguligt tilfar, ið er viðkomandi, og sum av røttum hoyrir heima í inni á hesari heimasíðuni, sigur Heðin Mortensen.

Inni á heimasíðuni er eisini eitt kort, har allur býurin er við, ella rættari sagt øll kommunan, tí Tórshavnar kommuna er langt frá bert Havnar býur longur. Eitt eyga vísir so til, hvar søgurnar hoyra heima, og við at klikkja á eyguni kemur tú inn í økið, har viðkomandi søga stavar frá.

Men tað ber eisini til at senda inn filmsklipp til heimasíðuna. Longu tá heimasíðan læt upp, vóru fleiri søgur lagdar út á síðuna, umframt stutt sekundirs filmsklipp frá Havnini í gomlum døgum.

- Vit hava eisini eina verkætlan í gongd at savna øll hesi filmsklipp á ein DVD, sum skal sendast til hvørt húski í kommununi. Tað verður væntandi einaferð tíðliga í juli mánaði. Hetta verður eitt savn av filmsklippum, sum fara at vara umleið hálvan tíma, sigur Heðin Mortensen.

Tað er felagið SUBSTANZ, sum hevur sniðgivið heimasíðuna, og sum eisini stendur fyri innsavnan og framleiðslu av filmsklippunum á DVD.

- Tað er væl møguligt, at alt tilfarið verður savnað saman í eitt rit, tá hetta 100-árið er farið aftur um bak, men tað er ikki tikin endalig støða til hetta enn. Fyribils er heimasíðan ætlað sum eitt søguligt íkast til Tórshavnar kommunu í 100 ár, sigur Heðin Mortensen.

# Nærkast semju

**Tað nærkast einari semju millum ABC-flokkarnar um Atlantsflog-málið, men full semja er kortini ikki um niðurstøðuna av fundinum millum flokkarnar**

NEVNDARVAL
*Leo Poulsen/Eyðun Klakkstein*

Fyrrapartin hava formenninir í Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum verið á fundi um spentu støðuna, og líkt er til, at ein semja kann fáast um málið.

Ætlanin nú er, at Vinnumálaráðið kallar privatu partaeigararnar í Atlantsflog á fund fyri at vita, um tað ber til at finna eina loysn saman við teimum um nevndarbýtið í Atlantsflogi.

Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, hevur havt ætlanir um at styrkja almennu umboðanina í nevndini hjá Atlantsflog og at skifta nevndarlimir út. Privatu partaeigararnir fingu herfyri at vita, at teir kunnu rokna við at missa sína umboðan í nevndini.

Tað hava partaeigararnir verið misnøgdir við, og Fólkaflokkurin bæð fríggjadagin løgmann steðga ætlanini hjá Johan Dahl. Í gjár gjørdi Kaj Leo Johannesen greitt, at hann fer ikki at blanda seg upp í málið, tí hann hevur álit á arbeiðnum hjá Johan Dahl.

Hetta fekk Fólkaflokkin at biðja um fund við løgmann, og í morgun hava leiðararnir í ABC-flokkunum fundast um málið. Jørgen Niclasen segði fyri fundin, at hann roknaði við, at flokkarnir fóru at finna eina semju.

Og líkt er til, at okkurt er komið burtur úr fundinum. Og ein partur av loysnini skal vera, at privatu partaeigararnir, sum eiga ein triðing av Atlantsflogi, verða bodnir á fund í Vinnumálaráðnum at tosa nærri um nevndarbýtið í felagnum. Tað er tó óvist, um upprunaliga ætlanin um at broyta nevndina í Atlantsflog verður broytt.

Men partarnir eru kortini ikki vorðnir samdir enn, tí teir hava hvør sína tulking av niðurstøðuni. Og vinnumálaráðharrin sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum, at hann ikki ætlar sær at bakka í málinum.

Politiska støðan er tí ógreið í løtuni, men Portalurin og Rás2 fara at fylgja við málinum seinnapartin.



*Tað er nevndin í Atlantsflog, sum er kjarnan í politisku ósemjuni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*